# Grønlendsk sjálvstýrisval



*Hernaðarstøðirnar hjá USA og framtíðar leikluturin hjá Grønlandi í Ríkisfelagsskapinum hava spælt ein týðandi leiklut í grønlendska valstríðnum. Myndin sýnir Kangerlussuaq, har USA hevði flogstøð*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Økt sjálvstýri hevur verið ovast á breddanum í valstríðnum í Grønlandi upp undir fólkatingsvalið. Allir flokkar siga seg vilja virka fyri øktum sjálvstýri. Líkt er til, at báðir grønlendsku fólkatingslimirnir verða skiftir út**

FÓLKATINGSVAL
*Magnus Dam*

Atasutt og Siumut hava higartil verið sjálvskrivaðir til teir báðar grønlendsku fólkatingslimirnar. Men stórur spenningur er upp undir valið hesuferð, og tað er ikki vist, at teir báðir flokkarnir enn einaferð fara avstað við hvør sínum fólkatingslimi.

Eygleiðarar rokna við, at tað verða tvey nýggj andlit at síggja í Fólkatinginum í staðin fyri tey bæði Ellen Kristensen úr Atasutt og Hans Pavia Rosing úr Siumut. Veteranurin Lars Emil Johansen úr Siumut hevur góðar møguleikar, og Kuupik Kleist úr Inuit Ataqatigiit verður spáddur at hava góðar møguleikar at taka sessin frá Ellen Kristensen.

### Uttanflokkalistar taka atkvøður

Í Grønlandi eru ongar veljarakanningar, sum lodda dýpið, og tí er ilt at siga, hvør fer avstað við sessunum. Men óvissan er størri nú, enn hon hevur verið fyrr, tí fleiri kend andlit stilla upp uttanflokka. Talan er um Otto Steenholdt, sum fyrr hevur sitið á Fólkatingi fyri Siumut, og Per Berthelsen, sum ikki longur er limur í Atasutt. Hesir báðir fara væntandi at taka nógvar atkvøður frá sínum gomlu flokkum, og hetta kann broyta grønlendsku fólkatingsumboðanina.

### Sjálvstýri á skránni

Høvuðsevnið í valstríðnum hevur verið økt sjálvstýrið. Øll 13, sum eru uppstillaði, lova at virka fyri øktum sjálvstýri og at îseljaî seg so dýrt sum gjørligt á Fólkatingi. Tað er bert Atasutt, sum frammanundan sigur seg fara at stuðla Anders Fogh Rasmussen. Siumut, sum higartil hevur styðjað Nyrup, fer ikki at gera tað treytaleyst einaferð enn.

Grønlendsku valevnini vilja hava eina nýggja skipan millum Danmark og Grønland. Eingin flokkur vil virka fyri loysing, men talan skal gerast um meira javnbjóðis viðurskifti millum londini.

Pengar hava spælt ein týðandi leiklut í valstríðnum, og grønlendarar fara at leggja stórt trýst á eina komandi danska stjórn um at fáa meira afturfyri, at amerikanarar hava hernaðarstøðir í Grønlandi. Í hesum sambandinum hevur Siumut tosað um, at danir spara 13 milliardir krónur av amerikansku støðunum.

Fleiri valevni vilja virka fyri, at Grønland sjálvt skal gera eina verjuavtalu við USA, sum so skal gjalda beinleiðis í grønlendska landskassan fyri støðirnar í landinum. Trýstið á donsku stjórnina fer sostatt at vaksa munandi eftir Fólkatingsvalið, sum verður sera avgerandi fyri framtíðina hjá Grønlandi í Ríkisfelagsskapinum.



# Kvinnurnar til pynt

*Fólkaflokkurin tóktist hava kvinnurnar til pynt á veljarafundinum. Menninir tóku myndina, og kvinnurnar hvurvu afturum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





**Veljarafundurin í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið vísti á ávís fyribrigdi í Føroyskum politikki. Kvinnurnar fingu lítlan part, og ungu kreftirnar í Tjóðveldisflokkinum hava tikið yvir**

VALFUNDUR
*Edvard Joensen*

Vongurin hjá Høgna Hoydal hevur tikið yvir í Tjóðveldisflokkinum. Fólkaflokkurin hevði fýra kvinnur við á fundinum, men tær fingu ikki orðið. Sambandsflokkurin goymdi formannin av vegnum.

Veljarafundurin í Norðurlandahúsinum sendi ávís tekin út, sum fók væl løgdu merki til, men kanska ikki øll hugsa um.

Millum annað møtti Fólkaflokkurin á fundi við trimum kvinnum, og roknaði veljarin sjálvandi við, at nú fór okkurt nýtt og áhugavert at verða at hoyra frá hesum valevnunum.

Men tað var so eiðasørt, at tær fingu orðið. Ein teirra var enntá royndur politikari, sum komin var úr Klaksvík, ivaleyst við eini røðu í taskuni.

Men her valdi flokkurin so heldur at lata løgmann og tveir landsstýrismenn, sum ongan nýggjan boðskap høvdu, fáa talutíðina, eins og Óli Breckmann, hvørs áskoðanir hvørt mannsbarn kennir, var heilar tvær ferðir á røðarapallinum.

Kenslan, fólk kring landið sótu eftir við, var, at her var talan um eitthvørt sølukatalog, har vakrar kvinnur verða nýttar sum sølufremjandi íkast.

Tjóðveldisflokkurin møtti við vælmannaðum Hoydalsveingi. Týðuligt var eisini at merkja, at teir høvdu skipað seg við klapparum, sum tó mest klappaðu fyri ávísum valevnum, meðan onnur fóru meira stillisliga framvið.

Eingin ivi tykist vera um, at í Eysturoynni er taktikkurin, at Torbjørn Jacobsen skal førast fram, og hann fekk eisini góða tíð á fundinum sunnukvøldið. Sigast skal eisini, at hann dugdi at nýta tíðina.

Sambandsflokkurin har aftur í móti tóktist koma eitt sindur tvørt fyri. Har er eingin greið linja at hóma hjá tí, sum ikki fær ein greiðan taktikk haðani lagdan fram undan slíkum fundi.

Fyrverandi formaðurin, Edmund Joensen, sum fólk annara hava fingið fata av, ikki myndar flokkin meira, var tann sum fekk mesta tíð, meðan formaðurin var sett upp allarseinast við tveimum minuttum, har hon ikki segði veljaranum nakað sum helst. Metingar eftir fundin vóru so mikið harðar, at onkur vildi vera við, at Sambandflokkurin seldi fólkatingssessin, veljarakanningarnar hava givið honum, á hesum fundinum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur bara menn uppstillaðar, og teir eru bara tríggir í tali, so har var ikki so nógv at velja í. Teir kláraðu seg eisini hampiliga væl á fundinum.

Miðflokkurin har aftur í móti møtti bara við monnum, hóast onkur kvinna er á listanum. At Miðflokkurin fer at kappast við Fólkaflokkinum um, hvør fer at hava mesta ávirkan á, hvussu orðini í Gamla Testamenti, hvussu Ísrael fer at yvirliva, fara at ganga út, gevur neyvan nógvar atkvøður.

Javnaðarflokkurin tóktist vera tann, sum hevði besta býtið. Helvt um helvt kvinnur og menn. Øll fingu orðið, hóast formaðurin var tvær ferðir.



*Vongurin hjá Høgna Hoydal tykist hava tikið yvir í Tjóðveldisflokkinum*



*Edmund Joensen tykist hyggja langt eftir formanspostinum í Sambandsflokkinum*




SKÍÐFERÐ - beinleiðis til Fraklands
19.-26. januar 2002
Seinasta tilmeldingarfreist 20. nov. 2001
MB-Tours M3
Tel 32 21 21 · Fax 32 21 22 · mb-tours@mb-tours.com